# Runavíkar Kommuna
## søkir *havnaumsjónarfólk*



Runavíkar havn er eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss. 3 fólk eru í føstum starvi. Árliga vitja umleið 1600 skip havnirnar í Runavíkar kommunu.

Av tí, at 1 av havnaumsjónarmonnum okkara fer frá fyri aldur, søkir Runavíkar kommuna eftir 1 havnaumsjónarfólki at byrja 1. februar 2008.

**Førleikakrøv o.a.**
Arbeiðið er burturav skipað í skiftandi vaktum undir leiðslu av havnarstjóranum og í tøttum samstarvi við onnur starvsfólk hjá kommununi.

**Av umsøkjarum vænta vit hesa førleikar**

- Viðkomandi útbúgving t.d. sum skipsførari
- Góðar málsligur førleikar, bæði í skrift og talu, í føroyskum, norðurlendskum og enskum.
- Teldukunnleiki.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið í lønarflokki 4,1. - 7. stig. Harafturat verður veitt ein føst mánaðarlig viðbót fyri vaktir.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita at venda sær til havnastjóran, Jón Nónklett, tel 288880.

**Umsóknir**
Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

Runavíkar kommunu
Heiðavegur 26
FO 600 Saltangará.

- og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 13. desember 2007, kl. 12.00.

Runavíkar kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir, ella onga at taka.

KREA

Runavíkar kommuna

Heiðavegur 26 · 600 Saltangará · Tel 417000 · Faks 417001
runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# Projektleiðarar og forritarar til Elektron

**Nógva ferðin í samfelagnum setur okkum stór krøv. Spennandi krøv. Tí økist og mennist eisini virksemið hjá P/F Elektron skjótt. Og her er tað, at vit hava brúk fyri tær sum projektleiðara ella forritara. Ovmikið er at gera, so vit ynskja at seta fleiri fólk í starv á báðum økjum.**

Vit raðfesta trivnaðin høgt. Her skal starvsfólkið trívast; fáa hóskandi avbjóðingar og hava møguleikan at menna seg fakliga eins og persónliga. Vit vilja eisini, at starvsfólkið er eyðkent fyri sín eldhuga, ábyrgdarsemi og hugin at vera til tænastu.

## PROJEKTLEIÐARAR
Arbeiða við at menna ymsu skipaninar saman við okkara dugnaligu starvsfólkum á Menningardeildini. Vit síggja fyri okkum, at tú ert ein sjálvstøðugur persónur, sum hugsar í loysnum, ert nærlagdur og málsøkin. Eisini er samstarv ein av tínum dygdum, eins og samskifti er tað í bæði skrivt og talu.

## WEB/.NET & HOST- FORRITARAR
Fara at fáa avbjóðandi og fjølbroyttar uppgávur í tí livandi og góða umhvørvinum á Menningardeildini, har 25 fólk starvast. Deildin veitir skipanir og tænastur til føroysku peningastovnarnar og almennar stovnar.

Vilt tú verða Web/.Net forritari hjá okkum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir við til dømis .NET, C#, VB, SQL, XML, AJAX, JAVA, Sharepoint og Web-tænastur.
Er tú hinvegin Host forritari, hugsa vit okkum, at tú áður hevur arbeitt við eitt nú PL1, CICS og DB2.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at seta seg í samband við Sámal Samuelsen, tlf. 345 108. T-postur: samals@elektron.fo.

## UMSÓKNARFREIST
Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagið á middegi mánadagin 7. januar 2008. Send umsóknina til P/f Elektron, Staravegur 9, Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, att: Ulla Joensen. Ella við telduposti til ulla@elektron.fo.

Stephanssons Hús

**P/f Elektron er millum landsins størstu veitarar av KT-tænastum til fíggjarfyritøkur, almennar stovnar og vinnuvirkir. Umframt at menna skipanarloysnir, veita vit tænastur innan infrastruktur og ymiskar hostingloysnir. Visiónin er, at okkara skipanar- og tænastuveitingar hava við sær, at kundin kann fremja framúr avrik á sínum virkisøki, samstundis sum trygdin og rakstrarstøðufesti eru í topp. 90 fólk starvast hjá P/f Elektron.**

Elektron